## Keane tímir ikki at grenja

Fyrrverandi írski landsliðsskiparin, Roy Keane, biður nú landsmenn sínar um at steðga grenjinum um franska málið, sum sendi Írland úr HM-undankappingini. – Teir vóru bangnir fyri at gera arbeiðið liðugt. Teir kunnu grenja so nógv, sum teimum lystir, men tað broytir einki. Frakland er landið, sum skal til HM, og Írland má bara koma víðari. Royndirnar at fáa samkenslu eru bara tær vanligu írsku, og tað keðir meg, sigur Roy Keane.



## Reyð tøl frá Parken

Flemming Østergaard hevur áður sagt, at Parken Sport & Entertainment, sum millum annað eigur FCK, framhaldandi fór at forvinna pening í 2009, men tann útsøgnin er nú broytt. Felagið sendi í farnu viku roknskapin fyri triðja ársfjórðing á marknaðin, og í hesum verður sagt, at ársúrslitið fyri 2009 verður á leið 250 milliónir í undirskot. Enn verður ikki roknað við, at FCK verður noytt at selja spælarar, men fleiri greinarar meta, at felagið um ikki so langa tíð er á einum fíggjarligum støði, sum kann sammetast við onnur donsk fótbóltsfeløg.



Jákup N. Olsen, formaður í Krabbameinsfelagnum, Jónsvein Knudsen og Høgni í Stórustovu, forseti í Fótbóltssambandinum, avmyndaðir í FSF-húsinum fyrrapartin fríggjadagin, tá Jónsvein fekk føroysku og írsku landsliðstroyggjurnar og gávubræv upp á eina landsliðsferð fyri tvey

Mynd: Fótbóltssambandið

# Jónsvein fekk landsliðstroyggjur

**Fyrrapartin fríggjadagin fekk Jónsvein Knudsen í Saltangará handaða føroysku landsliðstroyggjuna, hann ognaði sær á uppboðssøluni, tá landsinnsavningin hjá Krabbameinsfelagnum var síðst í oktober. Eisini fekk hann gávubræv upp á ferð við A-landsliðnum til ein av útidystunum í komandi EM-undankappingini**




Hilmar Jan Hansen

Tá Krabbameinsfelagið leygarkvøldið 31. oktober skipaði fyri stóru landsinnsavningini, ið var send í bæði sjónvarpi og útvarpi, var ein partur av innsavningini ein uppboðssøla, har ein av vinningunum var frá Fótbóltssambandinum. Hetta var ein landsliðstroyggja, sum allir spælararnir og venjarin høvdu sett sítt navn á.

Millum teirra, ið bjóðaðu, var kendi vinnulívsmaðurin og reiðarin í Saltangará, Jónsvein Knudsen, og tá avtornaði, átti hann hægsta boðið upp á 35.000 krónur og vann troyggjuna. Harumframt fekk hann eina ferð fyri tveir persónar við A-landsliðnum til ein av útidystunum í komandi EM-undankappingini.

– Eg hevði longu eitt boð inni upp á troyggjuna, men tá eg so sá, at eg hevði møguleika at fáa hana, hækkaði eg boðið, og tað gav bonus. Frammanundan hevði eg sett mær fyri, at eg fegin vildi stuðla hesum góða endamáli og vera við til at hjálpa, men tá so ein slíkur vinningur kundi fáast burturúr, gjørdi tað ikki uppboðssøluna verri, sigur Jónsvein Knudsen, sum hevur stóran áhuga fyri ítrótti.

Fyrrapartin fríggjadagin var hann so í FSF-húsinum í Gundadali eftir vinninginum, sum hann fekk frá Jákup N. Olsen, formanni í Krabbameinsfelagnum, og Høgna í Stórustovu, forseta í Fótbóltssambandinum. Men har var ein eyka vinningur aftrat, sum var ein írska landsliðstroyggja, ið Brian Kerr, landsliðsvenjari, hevði fingið til vega.

### Troyggjur á heiðursplássi

– Sjálvur hevði eg ikki roknað við, at hon eisini var signerað, so tað var eg sera glaður fyri. Ikki minst, nú írar blivu lumpaðir av fraklendingum mikukvøldið, so teir ikki sluppu við til HM-endaspælið í Suðurafrika, sigur Jónsvein, ið longu hevur gjørt av, hvar troyggjurnar báðar skulu fáa sítt pláss, tá tær fyrst eru blivnar vakurt innrammaðar.

– Tá NSÍ gjørdist føroyameistari í 2007, fekk eg frá felagnum eina troyggju, sum allir spælararnir høvdu sett sítt navn á. Nú eg havi fingið tvær slíkar troyggjur aftrat, fáa teir heiðurspláss undir liðini á NSÍ-troyggjuni, sum hongur á skrivstovu míni.

Hvussu ferðin til ein av útidystunum við A-landsliðnum í komandi EM-undankappingini verður brúkt, er sjálvandi eitt sindur torført at siga nakað um, tí lutakastið verður ikki fyrr enn í februar, so enn vita vit ikki, hvørji mótstøðulondini verða. Men Jónsvein hevur tó sínar favorittar.

– Eitt lið, føroyingar ofta hava ynskt sær at komið í bólk saman við, er Ongland, sum vit jú kenna væl til í Føroyum, tí næstan hvørt mansbarn fylgir við enskum fótbólti. Men sjálvur plagi eg at halda við Hollandi, sum mær altíð hevur dámt øgiliga væl, so tað hevði nú heldur ikki verið so galið, sigur fegni troyggjueigarin í Saltangará.

# Framtíðin er á veg

**U21-landsliðið er komið væl áleiðis í bestu undankapping, nakað føroyskt landslið nakrantíð hevur havt. Talentmassin er avgjørt til staðar, samstundis sum venjararnir eru komnir framúr væl frá uppgávuni**

KLUMMAN

*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*



Longu í síðstu undankappingini hjá U21-landsliðnum kom undan kavi, at her var okkurt gott á veg, og tað hevur liðið nú sett eina tjúkka striku undir. Hóast Andorra-javnleikurin leygardagin kanska yvirskuggar tað eitt sindur, so skerst ikki burtur, at talan samanlagt hevur verið um framúr avrik, ið kann gerast uppaftur betri, tá teir báðir síðstu dystirnir verða spældir komandi summar – fyrst heima ímóti Andorra og síðani úti ímóti Moldova.

Millum teirra, sum vóru við U21-landsliðnum til hesar báðar útidystirnar í farnu viku ímóti fyrst Lettlandi og síðani Andorra, var A-landsliðsvenjarin, Brian Kerr. Einki er at ivast í, at hann undir dystinum í Riga hevur sitið við næstan himmalvendum eygum, meðan hann hevur sæð føroysku fótbóltsframtíðina foldað seg út á vøllinum!

Um hann til komandi EM-undankappingina hjá A-landsliðnum velur at taka nakrar spælarar upp frá U21-landsliðnum, er tað ikki annað enn ein náttúrlig menning og sjálv meiningin við U21-landsliðnum. Tað er heldur einki nýtt, tí tað sama gjørdi undanmaðurin, tá hann tók fleiri spælarar upp frá U21-landsliðnum, sum í dag eru fastir fúsir á A-landsliðnum.

Av teimum 25 spælarunum, sum hava verið brúktir í hesi undankappingini hjá U21-landsliðnum, hava 11 framvegis aldur, so teir eisini kunnu vera við í komandi kapping hjá liðnum. Sostatt er framtíðin hjá føroyskum fótbólti í allarbesta hondum, tí talentmassin er har og sær eisini út til at verða gagnnýttur sera skilagott.

Ikki minst hava venjararnir báðir, Heðin Askham og Bill McLeod Jacobsen, víst framúr førleikar og evni at fáa tað besta burturúr, tí ein góð manning nyttar einki, er ikki gott fólk eisini á brúnni. Við røttum, djørvum og neyðugum avgerðum hava teir prógvað, at eisini á venjarasíðuni hevur føroyskur fótbóltur talent, ið ikki verður niðurgrivið, men brúkt á besta hátt!